# Sansabrestir á Skipasmiðjuni

**Áskoðararnir fáa brúk fyri øllum sansum, tá framsýning við 120 verkum hjá Tóroddi Poulsen letur upp á Skipasmiðjuni leygardagin. 20.000 fólk vitjaðu framsýningina í Danmark**

LIST
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Eitt føroyskt flagg úr bommum, kollagur, gøtukustar, tekningar, smáir pappírsbátar, 120 steinprent, túsundtals ørsmáar súkklur ...

Allir sansar standa á tá í verkunum á øðrvísi framsýningini »Steinsetingar« hjá Tóroddi Poulsen, sum letur upp í Listahøllini á Skipasmiðjuni leygardagin.

Á leið 130 verk eru við á framsýningini, sum fleiri enn 20.000 fólk sóu, tá hon var høvuðsframsýning á Kunstmuseum Sønderjylland tíðarskeiðið frá juni 2008 til januar 2009.



*Umframt nýggju verkini eru eisini nøkur av kendastu steinprentunum hjá Tóroddi Poulsen við á framsýningini »Steinsetingar«*

## Listarligt nýbrot

Flestu av verkunum eru umrødd í bókini Stensætninger, sum er gjørd til framsýningina. Í fororðinum lýsir, leiðarin á Kunstmuseum Sønderjylland, Ove Mogensen, listina hjá Tóroddi Poulsen sum eitt nýbrot í føroyskari myndlist. Sum leiðari á savninum heldur hann tað tí hava týdning at varpa ljós á listarliga universið hjá Tóroddi Poulsen, ið er ein av teimum fáu sum hevur brotið út úr føroysku siðvenjuni, har landslagið sum myndevnið framvegis fyllir mest.

Í bókin er eisini drúgvur tekstur, sum Kinna Poulsen, listaummælari hevur skrivað um listamannin, hansara verk og leiklut í føroyskari list.

Millum annað vísir Kinna Poulsen á, at eftir bert 12 árum er ein so eksplosiv menning farin fram í myndlistini hjá Tóroddi Poulsen, sum bert tey fægstu náa eitt heilt lív.

»Tað einasta, ið kann gera ein slíka menning møguliga, er, at Tóroddur í veruleikanum hevur verið myndlistamaður altíð. Og soleiðis havi eg altíð fatað hann. Tí hann tosar sum ein myndlistamaður við høvdinum á tremur av hugskotum til installatiónir, lutir og myndir. Hann skrivar sum ein myndlistamaður. Hann hugsar sum ein myndlistamaður og nógv bendir á, at hann eisini droymir myndlist«, skrivar Kinna Poulsen.

Hon leggur afturat, at sum myndlistamaður hevur Tóroddur Poulsen megnað at halda fast í at spontanitetinum og at síggja til tilvildarliga opinleikanum sum eyðkennir ótilvitaða og intuitiva skapan.

Framsýningin Steinsetingar letur upp leygardagin 4.apríl kl. 16.00 í Listahøllini á Skipasmiðjuni. Tað er leiðarin á Kunstmuseum Sønderjylland, Ove Mogensen, sum letur framsýningina upp.

Framsýningin er opin allar dagar frá kl. 14.00-18.00 fram til sunnudagin 19.apríl. Tó er stongt langa fríggjadag og páskadag.

# Nýggj listabók til børn

**Listasavn Føroya gevur nú út listabókina »Myndir í myndum«, sum er ætlað børnum og ungum**

NÝGGJ BÓK
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Tað eru Ingeborg Bugge, listfrøðingur, og Lydia Didriksen, rithøvundur, sum hava skrivað hesa fyrstu bókina í eini røð sum er ætlað at kveikja áhugan hjá børnum og ungum fyri myndlistini.

Bókin »Myndir í myndum« leggur dent á, at børn kunnu hugna sær við at hyggja at myndum og tosa um tær saman við vinum ella vaksnum.

Myndirnar eru býttar sundur í 9 ymisk evni, og til hvørja mynd eru nakrir spurningar settir, sum børnini kunnu hugsa um.

Kanska spurningarnir fáa børnini at kanna myndina nærri og at undrast, ella kanska spurningarnir fáa tey at seta nýggjar spurningar heldur enn at svara – og tað er júst tað, sum ætlanin er við bókini.

Listasavn Føroya eigur ella hevur allar 18 myndirnar í bókini í varðveitslu.

Innbundna bókin, telur telur 48 síður og er at fáa á føroyskum ella donskum.



*Málningur eftir Frimod Joensen, sum er endurgivin í bókini*




